## Meira um Myanmar

Um tú vilt hava meira at vita um stríðið í Burma ber til at vitja heimasíðuna HYPERLINK "http://www.freeburmacoalition.com" www.freeburmacoalition.com, sum er ein heimasíða til frama fyri demokratiskum broytingum í landinum. Eisini ber til at vitja almennu heimasíðuna hjá burmesisku stjórnini HYPERLINK "http://www.myanmar.com" www.myanmar.com, sum eisini umrøður ófriðin í landinum.



## Bloggarar siga frá

Bloggarar í Burma eru sera aktivir í hesum døgum. Ein máti at sleppa undan sensurinum hjá stjórnini er at leggja sínar egnu reportasjur út á netið. Ein av hesum bloggarum er Ko Htike, og hansara heimasíða sæst her: HYPERLINK "http://ko-htike.blogspot.com/" http://ko-htike.blogspot.com/. Her verða bæði myndir og upptøkur lagdar út.

# naðarstýri av



*Buddhistisku munkarnir eru sera høgt í metum millum manna, og tí aftrar stjórnin seg við at fara ov harðliga fram mótvegis munkunum. Avleiðingin kann nevniliga vera, at fólkið av álvara fer at venda sær frá hernaðarstýrinum, um munkarnir verða bardir niður. Mynd: Polfoto*

er eftir til heilsuverk, skúlar og útbyggingar.

Mótmælisgongurnar, sum nú eru at síggja, eru tær mest umfatandi, síðan uppreisturin í 1988, sum endaði í einum blóðbaði. Stjórnin sendi tá herin at berja mótmælini niður, og hjálparfelagsskapir mettu tá, at eini 3000 fólk lógu eftirá.

Í dag ber heimurin ótta fyri, at sama søga skal endurtaka seg, og at hernaðarleiðslan fer at nýta harðar metodur í síni roynd at teppa allar røddir, ið vága sær at krevja demokratiskar broytingar og vanlig mannarættindi.

Tí hava fleiri statsleiðarar heitt á stjórnina í Burma um at vísa hóvsemi yvirfyri demonstrantunum.

### Stjórnin ræðist munkarnar

Tey, sum kenna nakað til viðurskiftini í Burma, siga frá, at tað eru bert tveir stovnar, ið veruliga megna at mobilisera fólkið – tað er hernaðarstýrið og tað buddhistiska trúarsamfelagið.

Buddhistisku munkarnir eru sera høgt í metum millum manna, og tí aftrar stjórnin seg við at fara ov harðliga fram mótvegis munkunum. Avleiðingin kann nevniliga vera, at fólkið av álvara fer at venda sær frá hernaðarstýrinum, um munkarnir verða bardir niður. Stjórnin hevur eisini altíð roynt at sitið væl um sátt við andaligu leiðararnar í Burma.

Aung Naing Oo var ein av luttakarunum í uppreistrinum í 1988, og hann trýr uppá, at tað endiliga skal eydnast fólkinum at koppa generalunum.

- Eingin visti, hvat hendi í 1988. Tíðindi um tey mongu deyðu uppreistrarfólkini vórðu ikki borin kring heimin, og tí legði heimssamfelagið ikki trýst á stjórnina. Nú kunnu fólk fylgja við á internetinum, og øll verðin situr og fylgir gongdini. Tað er ein heilt onnur søga í dag, sigur Aung Naing Oo við BBC.

Hann leggur afturat, at ein annar týðandi munur kann vera, at í 1988 vóru tað studentar, ið stóðu á odda fyri uppreistrinum, men í dag eru tað buddhistisku munkarnir, sum ganga fremst, og teir kunnu møguliga loyva sær meira enn studentarnir.

Men eitt mark er tó fyri, hvat stjórnin letur sær lynda. Mánadagin boðaði hon frá, at útigonguforboð verður sett í verk, og fólk hava ikki loyvi at savnast í stórum tali. Hetta forboð hevur tó ikki verið virt, og mótmælini hava hildið fram kring landið.

Tí hevur stjórnin nú sent hermenn út á gøturnar, og seinastu tíðindini siga, at samanbrestir hava verið millum munkar og hermenn í gøtunum í Rangoon.

### Kinverjar eru fjálturstungnir

Meðan vesturlendskir statsleiðarar heita á stjórnina í Burma um at vísa hóvsemi og krevja broytingar í landinum, letur Kina, sum er størsti grannin hjá Burma, ikki við seg koma. Kina er størsti handilspartnarin hjá burmesisku stjórnini og er kanska tað einasta landið, sum kann leggja veruligt trýst á stjórnina.

Kina hevur eina traditión fyri ikki at leggja seg út í innanhýsis viðurskiftir í øðrum londum, og tí noktar kinesisku leiðararnir fyri at leggja trýst á stjórnina. Kina hevur seinastu árini flutt vápn inn til Burma og veitt stjórnini diplomatiskan stuðul.

Tann stóri trupulleikin hjá kinesisku stjórnini er tó, at hon ikki vil koma í ringt ljós í altjóða samfelagnum, nú olympisku leikirnir í Peking standa fyri durum. Um stjórnin í Burma fer harðliga fram ímóti mótmælisfólkunum, verður Kina skuldsett fyri at stuðla einum harðrendum hernaðarveldi, ið kúgar fólksins vilja.

Kinesiska stjórnin leggur ómetaliga stóran dent á at skapa eitt gott altjóða image, áðrenn leikirnar í 2008. Einki skal oyðileggja ta mynd, sum kinesiska stjórnin roynir at skapa av Kina, tá landið veruliga kemur í miðdepilin í 2008. Støðan í Burma kann seta Kina í eitt ringt ljós, og hetta er stjórnin í Peking greið yvir.

Burma er eitt av teimum mest afturlatnu londunum í heiminum, og saman við Norðurkorea hevur burmesiska stjórnin megnað at hildið fólkinum í landinum í einum jarntaki. Spurningurin er, hvussu leingi hetta kann halda fram.